HOFF STOFF

# Eingin royndarsmakkari

**Hóast søgur eru farnar at ganga um, at kongsfamiljan hevur ein sonevndan royndarsmakkara við sær, sum skal royna allan matin, áðrenn tey fara at eta, avsannar løgmansskrivstovan hesi tíðindi**

HOFF STOFF
*Eydna@sosialurin.fo*



*Hóast leysasøgur vilja vera við, at tey kongaligu hava ein royndarsmakkara við sær, sum skal royna allan matin,áðrenn tey kongaligu kunnu fáa sær, so avsannar løgmasskrivstovan tíðindini. – Hetta er ein slaturssøga, verður sagt. Maturin, tey fáa í Føroyum, verður í høvuðsheitum føroyskur matur úr sjónum*

Serliga í gomlum døgum var siðvenja, at tey kongaligu ikki ótu, fyrr enn ein royndarsmakkari hevði fingið sær av øllum matinum.

### Ósannindi

Og nú eru eisini søgur farnar at ganga, um ein royndarsmakkara, sum skal vera sendur til landið av danska kongshúsinum, fyri at tryggja, at allur matur og allar matskráir eru í lagi.

Men hvørki ríkisumboðið ella løgmansskrivstovan vita nakað um henda royndarsmakkara.

Jórun Ludvig á løgmansskrivstovuni sigur, at hon hevur sitið við øllum matskráunum, og um nakar royndarsmakkari var, so hevði hon vitað tað.

– Hatta má vera ein slatursøga, tí tað er heilt víst, at eingin royndarsmakkari kemur við, staðfestir hon.

### Mest føroyskur matur

Tey kongaligu skulu til tveir stórar døgverðar ímeðan tey eru her.

Annar verður í Norðurlandahúsinum mánadagin, og hin verður í Trongisvági týsdagin. Harumframt skulu tey fýra ferðir eta lættari máltíðir um middagleitið.

Jórun sigur, at tað er eitt stórt arbeiði at samskipa allar máltíðirnar.

– Tað eru í høvuðsheitum vertirnir, sum gera av hvør matskráin verður, men tað verður gjørt í samráð við meg og við kongshúsið. Eg royni m.a. at samskipa tað so, at tey ikki fáa sama matin í allastaðani. Tá so matskráirnar eru lidnar, verða tær sendar til Danmarkar til góðkenningar, greiðir Jórun Ludvig frá.

Hon sigur, at tað er sumt, sum tey kongaligu ikki vilja hava til matna, millum annað etur drotningin ikki lambskjøt, so lamb verður ongantíð á matarskránni. Og møguliga hava tey eisini onkur ynski, sum Jórun roynir at ganga á møti og flætta inn í matskráirnar.

Jórun sigur tó, at vertirnir í høvuðsheitum hava valt at seta føroyskan mat á skránna.

– Fyri tað allarmesta fær kongshúsið føroyskan mat. Men tað verður ikki hetta heilt serføroyska. Til dømis verður einki ræst á borðinum, greiðir Jórun frá.

– Tað verður nógvur matur úr havinum. Nógvur fiskur, krabbi og jákupskeljar, men tey fáa eisini fugl, t.d. lunda, sigur Jórun.

So Hennara Kongaliga hátign Mary sleppur at royna føroyska matin, uttan tó at fáa ilt í búkin.

### Hotellini á odda

Á stóra galladøgverðanum, sum verður í Norðurlandahúsinum mánadagin, tá løgmaður er vertur, verður tað Hotel Føroyar, ið stendur fyri matinum.

Og á galladøgverðanum í Trongisvági kemur maturin eisini úr Havn, nevniliga av Hotel Hafnia.

Spurd, um servitrisur og hjálparfólk annars vera vanlig, lokal fólk, ella um tað eru serlig krøv til starvsfólkið undir døgverðunum, svarar Jórun, at tað fyri tað mesta vera lokal fólk, ið fara at servera og hjálpa til.

– Í Trongisvági, veit eg, at tey saman við matinum eisini fáa tveir høvuðstænarar, sum líkasum skulu halda skil á og leggja lag á, tí tað skal jú vera ein ávísur høgur strandardur, tá tað er drotningin, ið er til borðs, sigur Jórun Ludvig á løgmansskrivstovuni at enda.

# Teir merkja vegin

**Arbeiðið við at merkja og strika upp føroysku vegirnar gongur best, tá turt og heitt er**

VEGAGERÐ



*Ein gonguteigur skal gerast við Hvítanesvegin í Hoyvík*
*Mynd: Landsverk*

**Asfaltering:** Hetta er tíðin tá menn hjá Landsverki leggja asfalt á føroysku landsvegirnar. Og eftir asfaltið skulu vegirnir eisini merkjast. Hesa vikuna eru teir í Suðuroy og í Norðoyggjum í hesum ørindum, og í komandi viku verður farið til Sandoynna at merkja vegirnar í oynni og við ferjuleguna í Skopun.

Í hesum arbeiðinum spælir veðrið ein avgerandi leiklut. Er veðrið turt og lýðka er í luftini, gongur tað við strúkandi ferð.

Arbeitt verður eisini um náttina, tá ferðslan er minst, men annars verður arbeitt um dagin.

Fýra mans eru í hesum arbeiðinum hjá Landsverki. Teirra arbeiði kann býtast í trý. Í fyrsta lagi er tað at strika og merkja vegirnar, í øðrum lagi at leggja hávatenn, og í triðja lagi at gera gonguteigar.

**sb.**

# 13 fáa ordan frá drotningini

**Ordanir verða vanliga givnir landsstýrisfólki, býráðsformonnum og fólki annars, ið ríkisumboðið metir hava havt týdning fyri landið og samfelagið**

HOFF STOFF
*Eydna@sosialurin.fo*



*Mánadagin fara 13 føroyingar at hitta Margrethu drotning, tá hon fer at handa teimum ymiskar ordanir*

Drotning Margretha hevur ikki nógvar uppgávur, tá hon kemur til Føroya, men eitt er tó álagt henni. Hon skal nevniliga geva nøkrum útvaldum føroyingum ordanir.

Ríkisumboðið velur nøkur fólk út, sum verða mett at hava serligan týdning fyri Føroyar. Tað eru sum oftast landsstýrismenn ella vinnulívsfólk, ið hava sett okkurt serligt í gongd.

### Umborð á Dannebrog

Ímeðan krúnprinsaparið fer ein túr í Havnar kirkju og á Margarinfabrikkina at hyggja seg um, fer drotningin aftur umborð á kongaskipið saman við teimum, sum ríkisumboðið hevur valt skulu fáa ordan hesuferð.

Ríkisumboðið vil ikki avdúka hvørji fólk fáa heiðurin mánadagin, men sagt verður, at tey vera 13 í tali.